

# Kloakkering
# í
# Vágs Kommunu
# 2011-2015

# Spillvatnsætlan fyri Vágs kommunu.

Við grundarlagi í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 111 frá 07. september 2009 um spillvatn er fylgjandi ætlan fyri spillvatnsútlát í Vágs kommunu gjørd

Hendan spillvatnsætlan fyri Vágs kommunu kemur í gildi tann 01.02.2011 og er galdandi til 31.12.2014 tá ætlanin væntandi er fullførd og Vágs kommuna lýkur øll lógarfest krøv til spillvatnsútlát.

**Innihaldsyvirlit:**


| | | |
|---|---|---|
| Spillvatnsætlan fyri Vágs kommunu | síða | 2 |
| Verðandi skipan | ” | 3 |
| Slag og nøgd | ” | 3 |
| Útleiðingarstøð og umhvørvið rundanum | ” | 3 |
| Ampar og umhvørvisárin | ” | 3 |
| Eftirlit og røkt | ” | 4 |
| Væntað menning | ” | 4 |
| Raðfesting av kloakeringsarbeiðum | ” | 4 |
| Viðmerkingar til økini | ” | 5 |
| Kort av økjunum | ” | 8 |
| Raðfesting av arbeiðum | ” | 21 |
| Kostnaðarmetingar | ” | 22 |
| Kort av ætlaðu høvuðskloakk | ” | 28 |
| Kort av verðandi skipan | ” | 29 |

**Verðandi skipan:**

Verðandi skipan er løgd í ymsum tíðarskeiðum og er gjørd úr ymsum tilfari, bæði betongrør, leirrør og plastrør. Seinastu nógvu árini er miðvíst arbeiði gjørt fyri at festa spillvatnsrørini á teldutøk kort við skipanini hjá MUNIN.
Øll kommunan Vágur er løgd í spillvatnsskipan og útlátini eru bæði á sjógv og í áir. Hvussu nógv útlát eru, er ilt at meta um, men tey eru nógv. Tær flestu útleiðingarnar fara á sjógv, men nógvar fara eisini í áirnar í býnum.
Flestu húski hava rottanga og sambært Býarskipanini fyri Vágs kommunu, eru 2 reinsiverk, uppsamlingstangar, í býnum, hesir eru á kajøkinum og á Báraldarbakka. Uml. 80 húski hava framvegis ikki rottanga og hava hesi fingið freist til 01.03.2011 at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Eftir hettar fær kommunan entreprenørar at gerða arbeiði fyri eigarans rokning.

**Slag og nøgd:**

Ta spillvatnið sum verður veitt í áir er frá vanligum húsarhaldum, har er ikki nakað spillvatn frá vinnu, meðan spillvatnið, sum fer á sjógv, eisini fevnir um vinnuligt spillvatn, her er tó mest talan um spillvatn frá fiskiíðnaðinum.

**Útleiðingarstøð og umhvørvið rundanum:**

Útleiðingarstøðini á sjógv verða í stóran mun førd oman á bakkan, men har kommunan hevur verði uppií tey seinastu árini, eru rørini førd undir sjóðarmálan, men koma partvís undan á lægstu fjørðu.
Har útlát eru í áir eru hesi oftani bara førd til áarbakkan og liggja tí sjónlig og atlit eru ikki tikin til hvussu áarbakkin við tíðini kemur at síggja út.

**Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini:**

Ringur luktur kann standast av teim mongu útlátunum, sum ikki koma undir sjógv, og útsjóndin rundanum rørini er ikki serliga innbjóðandi fyri fólk sum ganga framvið ella spæla í áum og við sjóvarmálan.

Við havnaøki verður nógv vatn leitt á sjógv og gerð hettar at t.d. alivinnan neyvan fær loyvi at hava ringar liggjandi út fyri havnalagið tá laksur skal takast og má tískil fara á annað stað at gerða hettar arbeiði.

**Eftirlit og røkt:**

Dagligt eftirlit og røkt er við skipanini, so hvørt trupulleikar stinga seg upp og tá rør verða skift út verður altíð brúkt nýggjasta tilfar. Seinasta útstykkingin, "í Fjallinum" er løgd í separatskipan, so yvirflatuvatn verður veitt í Gjógvará, og dálkað vatn verður veitt í pumpubrunnar og pumpa vesturum oynna, á streymasjógv.

**Væntað menning í kommununi**

Við verðandi menning av samfelagnum við hækkandi prísum á øllum sum vinna og húsarhald skulu brúka, eru útlitini fyri øking av fólkatali ella ídnaðarfyritøkum ikki so góð. Tó hevur kommunan tøk grundstykkir og vinnuøki eru tøk bæði til fiskivinnu og til aðra vinnu, har høvuðsdentur ikki liggur á fiskivinnu. Hædd verður eisini tikin fyri møguligari útstykking í Spillvatnsætlanini.

**Raðfesting av kloakeringsarbeiðinum:**

Arbeiði við at bøta um kloakkviðurskiftini verður byrja beinanvegin í 2011 og verður liðugt til 31.12.2014.

Arbeiði verður gjørt við at kommunan útvegar sær amboð, bil og maskinur og verða ta í mestan mun fólk frá kommununi sum gerða tað praktiska arbeiði.
At kommunan eigur amboðini hevur við sær, at meir fæst fyri pengarnar og at fleiri metrar av rørum kunnu leggjast enn um gjaldst skal fyri bæði grevstur og tilfar.

**Viðmerkingar til tey ymisku kloakkeringsøkini í bygdini sum eru merkt við bókstavum frá A til K.**

| | |
|---|---|
| **Øki A:** | Er býlingurin " í Fjallinum " Ítróttarøki, sunnari partur av Bøgøtu vestanfyri Gjógvará, " í Mýrunum " og " Kráir ".<br>Áarvatn, drenvatn og annað ódálka vatn rennur í Vatnið. Ein kloakk verður løgd til tað dálkaða vatnið og ein kloakk verður løgd til drenvatn og annað vatn sum ikki er dálkað. Tað dálkaða vatnið verður pumpað vesturum oynna.<br>Hettar arbeiði er gjørt |
| **Øki B:** | Framvið vestasta parti av Bøgøtu<br>Tvinnar kloakkir eru lagdar her. Áarvatn, drenvatn o.t. rennur í Gjógvará. Tað dálkaða vatnið verður pumpað vesturum oynna.<br>Partur av økinum liggur sum felagssystem. Rør skal leggjast í Bøgøtu, frá Vágsvegi og niðaneftir, uml. 250 m. spillvatn førast í verðandi rør eystanfyri Vatnið. Hettar fer so í pumpubrunnin í Mýrunum og verður pumpa vesturum oynna. |
| **Øki C:** | Øki við Ósagarð, frá gonguvegnum, Kráarvegur, og vestureftir eru bundin í pumpubrunnin í Mýrunum.<br><br>Tá hettar arbeiði er gjørt, eru allar leiðingar vestanfyri Gjógvará dagførdar og lúka nútíðarkrøv. |
| **Øki D:** | Øki frá Gjógvará út til matr. nr. 479 og frá Vágsvegi niðan í Brekkubø, verður veitt í Pumpubrunnin við Messuna, sum pumpar víðari til brunnin í Mýrunum.<br>Nøkur hús vestanfyri Misá, matr. nr. 464, 461, 465 og 466b skulu førast yvirum Gjógvará í rør sum liggur í Kráarvegnum í Pumpubrunnin í Mýrunum.<br>2 rør verða løgd í Tvørteig at separera leiðingarnar sum nú liggja og fyri at gerða klárt til møguliga útstykking í Brekkubø.<br>Matr nr. 457 og 455c verða førdir í nýggjum røri út til verðandi plastleiðing í vegnum og verðandi leirrør verður brúkt til veitir og regnvatn, sum verður leitt í Gjógvará. |
| **Øki E:** | Frá Matr. nr. 479 út til Toftabrekku, omanfyri Vágsveg og Toftaveg.<br>Rør verður lagt í Vágsveg frá Pumpubrunninum við Messuna út til vegamóti Vágsvegur - Toftavegur og víðari í Toftavegnum út til Gamla býlingin í Toftum. |
| **Øki F:** | Frá Krosslið omanfyri Toftavegin – Vágsvegin, út á Marknoyri.<br>Rør verður lagt í Toftavegin, frá Krosslágbrekku út til vendiplássið, har tað verður lagt omanum vegin og út á Marknoyri. Røri verður lagt millum húsini og neystini sunnanfyri Marknoyarvegin<br>Rørini verða samlað í brunn á Marknoyri, sum pumpar spillvatnið útum brimgarðin. |

| | |
|---|---|
| **Øki G:** | Framvið Líðarvegi, millum Ósagarð og kirkjugarðin<br>Rør verður lagt í ovari síðu á Líðarvegnum, frá Ósagarði út til matr nr 588, Líðarvegur 54<br>Ein íbúð í einum neysti og eini lítil summarhús eru, sum standa niðri við sjóðarmálan, niðanfyri Auto Vulk, hesi verða pumpa niðan í rør, ið skal ganga frá AutoVulk úteftir til Alexandru og pumpa harfrá niðan í rørið í Líðarvegnum.<br>Allir rottangarnir í økinum verða bundnir í røri frá AutoVulk til Alexandru.<br>Rør frá húsanr. 1 til 9 verða førd til pumpubrunnin niðanfyri Auto Vulk. |
| **Øki H:** | Er millum økini E og F umframt øki niðanfyri Toftaveg út til vendiplássið og alt havnaøki eystanfyri Skipasmiðjuna.<br>Rør skulu leggjast frá vendiplássinum vestur á Havnaøki.<br>Alt Havnaøki og tað sum rennur oman á Havnaøki millum økini E og F, skal skipast soleiðis at spillvatnið skal leiðast í felags pumpibrunn og førast í trýstrøri út til røri frá vendiplássinum til Marknoyri haðani tað verður pumpa út um brimgarðin. |
| **Øki J:** | Nes, Nýggj kloakkrør verða løgd framvið landsvegnum frá Petur á Nesi og út á sjógv við Sjóvartoftir, her verða allar spillvatnsleiðingar bundnar í. Regnvatn verður veitt í áir. Útleiðingin skal førast niður á 4 m. dýpi. |
| **Øki K:** | Garðarnir: hettar øki verður savna í pumpubrunn og pumpa niðan í rør í Vágsvegi. |
| **Øki L:** | Uttanfyri kirkjugarðin, niðanfyri Vágsveg og Toftaveg, út til Sueskanalina og Skipasmiðjuna.<br>Alt øki veråður savna í pumpubrunn niðanfyri Læknamiðstøðina og pumpa í røri í Vágsvegi, sum rennur vestureftir. |
| **Øki M:** | Neslíð vestur til Marknoyri<br>Her skulu rør leggjast framvið landsvegnum og førast vestur í brunn á Marknoyri.<br>Verðandi rør verða brúkt til regnvatn. |
| **Øki N:** | Kajøki verður, sum nevnt undir øki H, savnað í felags pumpibrunn og pumpa í rørið, sum gongur út á Marknoyri.<br>Allar kloakkir á Kajøkinum verða savnaðar gjøgnum smærri pumpibrunnar, allarhelst 4 stk, og førdar í omanfyrinevnda pumpubrunn.<br>Orsøkin til at hava fleiri smærri pumpubrunnar er, at tað er ringt at fáa nøktandi fall á leiðingarnar á kajøkinum og tað ber ikki til at grava serliga djúpt gjøgnum kajina. |
| **Øki Oy:** | Allar spillvatnsleiðingar á Oyrunum verða savnaðar í pumpubrunn og pumpa út um brimgarðin |


Dalsvegu
Traðavegur
Vágsvegur
Eldisvegur
© P/F FDS
ØKI A.
© P/F FDS
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360

ØKI A.




ØKI B


Bogota
Bogota
© P/F FDS
© P/F FDS
Oyrarvegur
Vágsvegur
Mísavegur
Lidarvegur
Kráavegur
Kráavegur
© P/F FDS
© P/F FDS
Eggjavegur
ØKI C
50 m
100 ft
Mát = 1 : 3180

ØKI C


Langatrøð
Skálabeiti
Skálavegur
Traðavegur
ØKI D
Bogota
© P/F FDS
Bogota
Oyrarvegur
Beitið
í Mýrunum
Líðarvegur
Kráavegur
© P/F FDS
50 m
100 ft
Mát = 1 : 3180

ØKI D


© P/F FDS
Bjargatroðin
Dalsvegur
ØKI E
Skálavegur
Hogabo
Geilin
Krossið
Fossavegur
Toftavegur
Vágsvegur
Bogota
Bryggjan
© P/F FDS
Kráavegur
Eggjavegur
Líðarvegur
100 m
200 ft
© P/F FDS
Mát = 1 : 6360

ØKI E.



S 12



© P/F FDS
ØKI F
Gellin
Toftavegur
Vágsvegur
Bryggjan
Marknoyrarvegur
Á Oyrunum
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360


ØKI F.


Bjargatrøðin
Dalsvegur
Hogabo
Skálavegur
Fossavegur
Toft
Vágsvegur
Bogota
Brý
Vágsvegur
© P/F FDS
Kráavegur
Kráavegur
Eggjavegur
Líðarvegur
ØKI G
© P/F FDS
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360

ØKI G.


© P/F FDS
Bjargatrøðin
Geilin
Høgabø
Krossliõ
Fossavegur
Toftavegur
Vágsvegur
Bryggjan
Vágsvegur
© P/F FDS
Líðarvegur
Á Oyrunum
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360

ØKI H.


© P/F FDS
© P/F FDS
Á Nesi
ØKI J.
Á Nesi
© P/F FDS
© P/F FDS
50 m
100 ft
Mát = 1 : 3180

ØKI J.







ØKI K.


Geilin
Hogabo
Fossavegur
Toftavegur
Vágsvegur
© P/F FDS


Líðarvegur
© P/F FDS
50 m
100 ft
Mát = 1 : 3180

ØKI L.


Stórheygjur
Marknoyrarvegur
Nesvegur
© P/F FDS
© P/F FD
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360

ØKI M.


Kró
Toftavegur
Vágsvegur
Vágsvegur
Bryggjan
Stórhey
Marknoyri
© P/F FDS
Á Oyrunum
ØKI OY.
© P/F FDS
100 m
200 ft
Mát = 1 : 6360

ØKI OY.

**Raðfesting av arbeiðinum:**

**Hvussu er ætlanin at fara fram:**

Vágs kommuna hevur enn einaferð heitt á teir borgarar, sum ikki hava rottanga, um at fáa hettar gjørt innan 01.03.2011. Aftaná hetta fer kommunan undir at útvega fólki rottangar fyri teirra egnu rokning. Býráðið hevur staðfest avgerð um at øll húski í kommununi skulu hava góðkendan rottanga.

Í næstu framtíð verður eisini skriv sent út til fólk, sum hevur djórahald av ymiskum slag, um at fáa sær køst og at onki frárennsl skal renna í áir og kloakk hjá kommununi.

**Viðv. Spillvatni:**

Kommunan ætlar at býta býin upp í økir og so gerða kloakkina, øki fyri øki. Ætlanin er at onki spillvatn skal latast í Vágsfjørð innanvert brimgarðin og at spillvatnið frá meir enn helminginum av býnum verður pumpað vestur um oynna.

Uttari partur á norðara armi verður pumpaður út um brimgarðin. Her er ætlanin at rør verður lagt eftir botni frá Marknoyri nakað út um brimgarðin. Bløðingarstøð verður til laks á Oyrunum har frárennsl verður veitt út um brimgarðin eisini. Sum frá líður er ætlanin at vágin verður so rein at laksur kann takast inni við laksavirkið hjá Faroe Farming

Øki A er alt savnað í pumpubrunn eystanfyri Vágshøll og pumpa vesturum oynna

**Fyrsta** øki verður øki B, har rør verða løgd í Bøgøtu, at taka spillvatnið frá teim húskjum sum fara í Laksá saman við regnvatninum. Talan er um einar 250 m. av røri sum skal leggjast í gongubreytina. Á hendan hátt verður bara regnvatn veitt í vatnið og Laksá og verður hendan sostatt rein.

Harumframt skulu teir persónar sum hava seyðahald og annan fenað framvið Gjógvará og Laksá, hava boð um at onki frárennsl frá djórahaldi skal renna í áirnar, so hesar eisini gerðast reinar.

**Næsta** øki verður øki J, øll bygdin Nes, har rør verður lagt omanfyri Landsvegin, sum so kann taka ímóti øllum spillvatni frá húskjunum á Nesi. Røri verður ført undir landsvegnum oman fyri Sjóvartoftir og ført á sjógv har, 1 m undir lægstu fjøru.

**Triðja** øki verður øki D, frá Gjógvará út til matr. nr. 479 og frá Vágsvegi niðan í Brekkubø, hettar øki verður veitt í Pumpubrunnin við Messuna, sum pumpar víðari til brunnin í Mýrunum.

Nøkur hús vestanfyri Misá, matr. nr.464, 461, 465 og 466b skulu førast yvirum Gjógvará í rør sum liggur í Kráarvegnum og førast í Pumpubrunnin í Mýrunum.

Hetta øki er í løtuni felagssystem, her skal eitt ávíst arbeiði til fyri at separera regnvatnið frá, so hettar verður ført í áir har tað er gjørligt og annars beinleiðis á sjógv.

**Ætlanin er at hesi trý økini verða gjørd í 2011. Tilfarskostnaður fyri hettar er kr. 328.265,00**

**Fjórða** øki er øki E, har nýtt rør verður lagt í vegin frá pumpubrunninum við Messuna úteftir Vágsvegnum og niðan í Toftir, hettar fyri at taka alt spillvatn sum kemur oman úr Brekkubø og úteftir. Hædd skal takast í dimentioneringini fyri møguligari útstykking í Brekkubø.
Eisini her er galdandi at øll rør verða førd á sjógv í felagssystemi, hettar má skiljast sundur, men í fyrsta umfari er ætlanin at fanga alt sum er omanfyri ávikasíst Vágsveg og Toftaveg, so bert tey húski og tær vegristir sum eru í og niðanfyri hesar vegir, verða førd á sjógv, hetta fer at minkað munandi um dálkingina á fjørðinum.

**Fimmta** øki er øki K, Garðarnir, her má tað mesta leggjast av nýggjum og gomlu rørini kunnu so framvegis brúkast til regnvatnið sum skal á sjógv. Spillvatnið skal leiðast í pumpubrunn sum pumpar vatnið niðan í røri í Vágsvegi og rennur vestureftir.

**Sætta** øki er øki L, uttanfyri gamla kirkjugarðin til Skipasmiðjuna og niðan við Suezkanalini til Toftaveg. Hettar skal savnast í pumpubrunn og pumpast niðan í røri í Toftavegnum, so tað rennur vestureftir. Eisini her er galdandi at leggja nýggj rør til spillvatn og brúka verðandi rør, sum verða førd á sjógv og áir, til regnvatn.

**Sjenda** øki er øki F, har rør verður lagt í Toftavegin út eftir, røri verður ført yvir í niðari síðu á Marknoyrarvegi við vegamóti Toftavegur – Marknoyrarvegur og tekur spillvatn omanfyri Toftavegin og framvið Marknoyrarvegnum.
Á Marknoyri verða rørini førd í pumpubrunn sum pumpar vatnið út um brimgarðin.

**Ætlanin er at hesi fýra økini verða gjørd í 2012. Tilfarskostnaður fyri hettar er kr. 914.712,25**

**Áttanda** øki er øki H, Havnaøki. Frá vendiplássinum verður rør lagt niðanfyri húsini framvið Vágsvegi at savna spillvatn frá rottangum her og savna tað saman við havnaøkinum, har ætlanin er at savna alla spillvatnsskipanina á havnaøkinum, í ein brunn og pumpa vatnið út í røri niðanfyri Marknoyrarveg, so hetta rennur í brunnin á Marknoyri.

**Nýggjunda** øki er øki G, har rør verður lagt í ovaru síðu á Líðarvegnum at taka ta spillvatn sum er omanfyri vegin og føra tað vestur í pumpubrunnin í Mýrunum. Frá Auto Vulk verður rør lagt niðanfyri húsini framvið Líðarvegnum, út til Alexandru, harfrá tað verður tað pumpa niðan í rørið í Líðarvegnum. Spillvatn má pumpast frá 2 rottangum niðan í røri við Auto Vulk.

**Ætlanin er at hesi tvey økini verða gjørd í 2013. Tilfarskostnaður fyri hettar er kr.415.417,75**

**Tíggjunda** øki er øki Oy, vinnuøki á Oyrunum, hetta verður savnað í pumpubrunn sum pumpar spillvatnið útum brimgarðin.

**Ellivta** øki er øki M: Neslíð, har rør verður lagt í ovaru síðu á vegnum at taka spillvatnið frá rottangunum framvið vegnum og leiða tað í brunnin á Marknoyri og pumpa saman við hinum út um brimgarðin.Tey rørini sum liggja har frammanundan verða brúkt til regnvatn.

**Ætlanin er at hesi fýra økini verða gjørd í 2014. Tilfarskostnaður fyri hettar er kr. 236.770,00**

Galdandi fyri allar leiðingar, sum lagdar verða er, at hesar í størstan mun koma at virkað sum spillvatnsleiðingar beinanvegin og at verðandi leiðingar verða skipaðar soleiðis, at tær bara taka regnvatn og leiða hettar í áir og á sjógv, hettar fyri at onki spillvatn skal renna í fjørðin innanvert brimgarðin, so hesin verður reinur sum skjótast.

Tey sum hava fenað, seyð- gæs- høsn- dunnur o.l. skulu eisini lúka treytirnar í umhvørvislógini og útvega sær køst, so einki útlát frá slíkum djórahaldi verður veitt í áir, løkir, verðandi kloakskipan ella á sjógv.

**Kostnaðarmeting fyri Økini:**

Øki J, Nes

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 134 lgd | á | 640,00 kr. | = | 85.760,00 kr |
| 110 PVC | 25 lgd | á | 312,00 kr | = | 7.800,00 kr |
| Útleiðing | 1 stk. | á | | | 20.000,00 kr |
| | | | | | 113.560,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 28.390,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **141.950,00 kr** |

Øki M, Neslíð

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 154 lgd | á | 640,00 kr. | = | 98.560,00 kr |
| 110 PVC | 34 lgd | á | 312,00 kr. | = | 10.608,00 kr |
| 110 PVC | 24 lgd | á | 312,00 kr. | = | 7.488,00 kr |
| Útleiðing | 1 stk. | á | | | 20.000,00 kr |
| | | | | | 136.656,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 34.164,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **170.820,00 kr** |

Øki B, Bøgøta

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 42 lgd | á | 640,00 kr. | = | 26.880,00 kr |
| Samanbinding | 1 stk. | á | | | 20.000,00 kr |
| | | | | | 46.880,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 11.720,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **58.600,00 kr** |

Øki D, í Smillum

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 110 PVC | 21 lgd | á | 312,00 kr. | = | 6.552,00 kr |
| Íbinding | 2 stk. | á | 10.000,00 kr. | = | 20.000,00 kr |
| | | | | | 26.552,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 6.638,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **33.190,00 kr** |

Øki D, í Smillum klárgerð til útstykking í Brekkubø

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 250 PVC | 30 lgd | á | 1650,00 kr. | = | 49.500,00 kr |
| 315 PVC | 10 lgd | á | 2612,00 kr. | = | 26.120,00 kr |
| | | | | | 75.620,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 6.638,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **94.525,00 kr** |

Øki E, Frá Matr. nr. 479 út til Toftabrekku, omanfyri Vágsveg og Toftaveg

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 400 PP | 75 lgd | á | 4022,00 kr. | = | 301.650,00 kr |
| 315 PP | 53 lgd. | á | 2203,00 kr. | = | 116.759,00 kr |
| | | | | | 418.409,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 104.602,25 kr |
| | | **Í alt** | | | **523.011,25 kr** |

Øki F, Frá Matr. nr. 173 Krosslágbrekka

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 200 PP | 79 lgd | á | 1037,00 kr. | = | 81.923,00 kr |
| 315 PP | 74 lgd. | á | 2203,00 kr. | = | 163.022,00 kr |
| | | | | | 244.945,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 61.236,25 kr |
| | | **Í alt** | | | **306.181,25 kr** |

Øki H, vendiplássi vestur til havnaøki

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 200 PP | 54 lgd | á | 1037,00 kr. | = | 55.998,00 kr |
| 200 Trýstrør | 324 m | á | 124,00 kr. | = | 40.176,00 kr |
| | | | | | 96.174,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 24.043,50 kr |
| | | **Í alt** | | | **120.217,50 kr** |

Øki G, Líðarvegur

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 105 lgd | á | 640,00 kr. | = | 67.200,00 kr |
| 110 PVC | 30 lgd | á | 312,00 kr. | = | 9.360,00 kr |
| 110 PVC | 40 lgd | á | 312,00 kr. | = | 12.480,00 kr |
| | | | | | 89.040,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 22.260,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **111.300,25 kr** |

Øki K Garðarnir

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 38 lgd | á | 640,00 kr. | = | 24.320,00 kr |
| 110 PVC | 7 lgd | á | 312,00 kr. | = | 2.184,00 kr |
| 110 Trýstrør | 72 m | á | 124,00 kr. | = | 8.928,00 kr |
| | | | | | 35.432,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 8.858,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **44.290,25 kr** |

Øki L millum gl. Kirkjugarð og skipasmiðjuna

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 160 PVC | 20 lgd | á | 640,00 kr. | = | 12.800,00 kr |
| 110 PVC | 17 lgd | á | 312,00 kr. | = | 5.304,00 kr |
| 110 Trýstrør | 120 m | á | 124,00 kr. | = | 14.880,00 kr |
| | | | | | 32.984,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 8.246,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **41.230,00 kr** |

Øki M, Neslíð

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 110 PVC | 118 lgd | á | 312,00 kr. | = | 36.816,00 kr |
| | | | | | 36.816,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 9.204,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **46.020,00 kr** |

Øki Oy, Oyrarnar

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 110 PVC | 125 lgd | á | 312,00 kr. | = | 39.000,00 kr |
| 110 Trýstrør | 400 m | á | 124,00 kr. | = | 49.600,00 kr |
| | | | | | 88.600,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 22.150,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **110.750,00 kr** |

Øki N, Havnarlagið

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 110 PVC | 40 lgd | á | 312,00 kr. | = | 12.480,00 kr |
| 160 PVC | 35 lgd | á | 640,00 kr. | = | 22.400,00 kr |
| 110 Trýstrør | 260 m | á | 124,00 kr. | = | 32.240,00 kr |
| | | | | | 67.120,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 16.720,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **83.900,00 kr** |

**Pumpubrunnar:**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Størri stødd | 2 stk | á | 60.000,00 kr. | = | 120.000,00 kr |
| Smærri stødd | 11 stk | á | 20.000,00 kr. | = | 220.000,00 kr |
| | | | | | 340.000,00 kr |
| | | Mvg 25 % | | | 85.000,00 kr |
| | | **Í alt** | | | **425.000,00 kr** |

**Samlaður tilfarskostnaður fyri spillvatnsætlanina:** **2.236.695,30 kr**